# Hákun Joensen til minnis



Sum altíð tá deyðin pikkar á dyrnar, standa vit bæði bilsin, hjálparleys og spyrjandi. Ikki tí at tað mangan kemur so dáttliga við. So at siga hvønn dag hoyra vit í útvarpinum at tey eru farin av verðini – mangan á ungum aldri. Hvørja ferð dregur hugur flestu okkara til ta stund, tá nøvn okkara verða nevnd í andlátslýsingum, ið tey avvarðandi merkja. Tá kann tað okkum gera tað sama.

Nú ein dagin fyri kortum varð kunngjørt, at Hákun Joensen við Dalagøtu var farin av verðini 81 ára gamal. Veikur var hann vorðin ta seinastu tíðina; kortiliga ikki so illa fyri, at vit báðir – Hákun – kundu skifta orð um mangt og hvat. At honum leið at evsta tíma, seinast eg støkk inn á gólvið hjá honum og Solveig, vardi meg ikki.

Hákun var ein teirra, ið gjørdi lítið burturúr sær. Stillførur og lítillátin, men virkin. Í mong ár var hann bókhaldari hjá ESSO, til hann seinni stovnaði sítt egna bókhaldaravirki.

Mong vóru tey, ið leitaðu sær ráð hjá honum, og eingin teirra fór tómhentur haðani.

Arbeiðssamur sum hann var, fekk hann sær eina trøð til leigu úti í Havnardali. Har velti hann epli og annað ið okkara karga jørð kundi geva av sær við góðari viðferð. Har hevði hann seyð og skurður hansara vignaðist eins væl og hjá okkum, ið høvdu seyð gangandi frammi undir Sneis.

At vit báðir gjørdust vinmenn komst millum annað av, at kona mín og Hákun vóru so nær skyld. Pápi hennara og Hákun vóru systkinabørn. – Hákun var ættaður úr Sumba. Væl at sær komin fór hann til Vágs at ganga í skúla og tók realskúlaprógv har. – Haðani fór hann niður til Danmarkar at búgva seg víðari út.

Aldur upp í einum trúgvandi heimi, bar hann mangan upp á mál ta stund, tá ið vit skulu fara higani – serliga nú hann var vorðin so veikur. Í kirkju var hann hvønn sunnu- og halgidag so leingi, hann orkaði.

Góða Solveig! Tað kenst tómligt hjá tær, nú hann er farin. Kortini fari eg ikki at leggja av at støkka inn á gólvið hjá tær av og á.

Hvíl í friði, góði Hákun.

**Ívar**

## Andlát og jarðarferðir

**Mikkjal Petur Jacobsen, Þorkeri**, vanliga nevndur Petur í Fugloy, andaðist mánadagin á Suðuroyar sjúkrahúsi, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Mikkjal Petur Jacobsen**

Þorkeri

vanliga nevndur Petur í Fugloy andaðist mánadagin á Suðuroyar Sjúkrahúsi, 85 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Sjúkrahúsinum mikudagin kl. 17.30.
Jarðarferðin verður úr Betania hósdagin kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Frida**
**Selma, Martin og Jákup við familjum**

Tey, ið ynskja at minnast Petur við blómum ella kransum, kunnu lata eina peningagávu til Zarepta. Konta í peningastovnunum.

Arthur Ellingsgaard:

# 25 ára starvsdag hjá Eiðis kommunu

16. august hevur Arthur Ellingsgaard á Eiði verið í starvi hjá Eiðis kommunu sum umsjónar- og arbeiðsmaður í 25 ár.

Í sínum arbeiði hjá kommununi við vatn, kloakk og rørarbeiðum hevur hann verið sera vælgerðin. Tá ið tað í arbeiði hansara hevur verið neyðugt at givi fólki boð um nakað, so hevur hann eisini kent tað sum skyldu sína og gjørt tað uttan makra misfatan.

Tá tað stóra SEV-arbeiði fór í gongd her á Eiði, stóð valið hjá Arthuri at fara í arbeiði har við møguleika til nógv skjótari og størri inntøku enn hjá kommununi, men hann valdi heldur at halda áfram hjá kommununi í sínum tímalønta arbeiði har.

Arthur er úr Durhúsi á Eiði og er giftur Olgu, f. Hansen, eisini av Eiði. Tey eiga tríggjar døtur.

**Jógvan**




**Dagurin í morgin**

**16. august. Rokus,** deyður umleið ár 1330. Varð føddur í Montpellier og gjørdist kendur sum tann, ið grøddi fólk, ið vóru rakt av sótt. Tá ið hann kemur til hús eftir ein pílagrímsferð til Róm, verður hann lagdur undir at njósnast, verður tikin og kastaður í fangahús, har hann doyr.

# Tøkk

Fyri sýnda samkenslu við jarðarferðina hjá

**Maggu Oldfield**

takka vit hjartaliga.

*Familjunnar vegna*
**Dania**

# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra fastur, mostir, abba- og ommusystur og langabba- og langommusystir okkara

**Poulina S. Poulsen**
Eiði

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum í Korndalsbýlinum á Eiði, somuleiðis tøkk til G4 á Landssjúkrahúsinum og tykkum á Røktar- og Elilsheiminum í Runavík fyri góða umsorgan og hjálpsemi.
Tøkk til Emil Olsen, prest fyri vøkur orð.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hans Jákup**

Lesið Sosialin - so eru tit við